# Oddagrein



**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*

# HANDILSFÍGGJAÐ PUBLIC SERVICE

Ein public service sáttmáli skal gerast millum Kringvarp Føroya og Mentamálaráðið. Ein slíkur sáttmáli skal tilskila, hvørjar skyldur miðilin hevur mótvegis Føroya fólki. Tað merkir, at Kringvarpið virkar í fólkins tænastu - at tað skal tæna borgarunum, ið rinda kringvarpsskatt fyri hesa tænastu.

Vit, sum reka privatar miðlar, sum bara eru fíggjaðir av tí, sum vit forvinna, gleða okkum til hendan sáttmálan, tí tá má tann himmalrópandi órættur, sum tað almenna fremur móti privatum fyritøkum steðgast. Tað er ikki rætt, at ein stovnur, sum krevur kringvarpsskatt frá fólki, eisini skal kunna kappast um handilslýsingar, sum verða bodnar út fyri undirprís. Hetta er so órættvís kapping, at Kappingarráðið átti at steðgað hesum, tá politikkararnir ikki sjálvir klára tað.

Privatu miðlarnir vilja ikki hava almennan stuðul. Men um tað er eitt politiskt krav, at Kringvarpið bæði skal vera eitt public service kringvarp og eitt kommersielt kringvarp, so ber ikki til, at Kringvarpið samstundis einsamalt skal eiga kringvarpsskattin. So má hesin kringvarpsskattur lutast út millum hinar miðlarnar eisini.

Eins og so mong onnur vinnuvirki, so eru privatu fjølmiðlarnir eisini í tungum sjógvi í hesum tíðum. Fleiri bløð eru steðgað - og og fyrr í ár fór Føroya elsta blað, Dimmalætting, av knóranum, fyri síðani at verða loftað og uppkeypt av tveimum fyrrverandi reiðaríum saman við Føroya Banka, sum nú reka blaðið.

Í slíkum tíðum harðnar kappingin, og tann sterkasti klárar seg. Tað er eisini alt í lagi við tí, men so skal tað eisini verða á einum rættvísum grundarlag. Men her er tað, at Helena Dam á Neystabø hevur trupulleikar við Kringvarpi Føroya, sum ikki at merkja tey konjunktursveiggj, sum vit onnur í fakinum merkja. Men tað ger stovnurin, tí hann er kommersiellur. Stovnurin missir eisini trúvirði, tá hann má ganga upp á kompromis við journalistiska integriteti. Í fleiri førum verður lýsingatilfar smoygt inn í




sendingar, eitt nú tá morgunsendingin má fortelja, hvat merki bilurin er, sum tey koyra í - og hvør bilasøla eigur hann, ella tá Kringvarpið selur lutaseðlar saman við privatum fyritøkum, sum sleppa í útvarpsstovuna afturfyri.

Slíkar tankar skulu vit ikki hava um Kringvarp Føroya. Vit eiga heldur at verða góð við Kringvarpið, tí hetta er ein so týdningarmikil mentanarstovnur. Tí skal politiski myndugleikin geva Kringvarpinum tær sømdir, sum stovnurin skal hava - og lata privatu miðlarnar um handilsliga partin. Tað er og verður so parturin hjá privatu miðlunum at tryggja, at journalistiski integriteturin verður hildin í hásæti.

**Skattafíggjað kringvarp skal ikki kappast við tað privata**

## Heðin skilir ikki atfinningarnar

### Heðin Mortensen skilir ikki atfinningarnar hjá Marini Katrinu Frýdal um parkeringsbásarnar á Kongabrúnni

Uni Holm Johannesen



- Eg veit einki um, at eg hevði ikki undirtøku, er greiða aftursvarið hjá Heðini Mortensen til Marin Katrinu Frýdal.

Martin Katrina Frýdal segði í Sosialinum mánadagin, at tað var Heðin Mortensen, sum einsamallur tók avgerðina, at parkeringsbásarnir á Kongabrúnni skuldu burtur. Eingin annar.

Borgarstjórin segði í farnu viku, at Byggi- og býarskipanarnevndin mælti til, at parkeringsbasarnir skuldu burtur, men tí vísti Frýdal staðiliga aftur.

- Heðin Mortensen hevur ikki lurtað eftir okkum, og tað eru fleiri býráðslimir týðiliga argir um. Hann hevur ignorerað okkum í hesum málinum, segði Marin Katrina Frýdal.

Heðin Mortensen sigur, at básarnir noyddust burtur.

- Kommunan hevur gjørt umfatandi arbeiði á Kongabrúnni, og bilarnir foraðu arbeiðinum. Tí hvurvu parkeringsbásarnir. Nú er arbeiðið liðugt, og básarnir koma aftur. Søgan er ikki longri, sigur Heðin Mortensen.

Marin Katrina Frýdal sigur, at tú hevur ignorerað býráðslimirnir í hesum málinum. Hevur tú tað?

- Sum sagt, eg veit einki um, at eg ikki hevði undirtøku. Tað var eitt krav frá arbeiðsmonnunum, at básarnir hvurvu í eina tíð, meðan arbeiðið var gjørt. Um Marin Katrina Frýdal hevur viðmerkingar, so eru hon vælkomin at siga tað við meg, áðrenn hon fer til fjølmiðlarnar. Eg havi einki hoyrt frá henni í hesum sambandinum. Tað vísir seg ofta at vera ein trupulleiki hjá ymsum býráðslimum, tí slíkir trupulleikar skulu viðgerast innanhýsis fyrst, um tað er, sigur Heðin Mortensen.



**Er Bjørn Kalsø lopin á bláman**

GERHARD LOGNBERG
KJAK Á SÍÐU 33



**Sóla sær uttan ábyrgd**

BJØRT SAMUELSEN
KJAK Á SÍÐU 36

## Støðan hjá sjónveikum á breddan

Sosiala støðan hjá sjónveikum og blindum á breddan

Sosiala støðan hjá sjónveikum og blindum í útbúgvingarsamanhangi og á arbeiðsmarknaðinum verður viðgjørdi í fyrilestri hjá Peter Rodney hóskvøldið.

Hósdagin 2. september klokkan 20 verður fyrilestur á Sjóndeplinum við Peter Rodney, ungdómsráðgeva/sálarfrøðingi.

Peter Rodney arbeiðir á Instituttet for Blinde og Svagsynede í Hellerup og hevur drúgvar royndir at arbeiða við ungum, sjónveikum og blindum, ið hava trupulleikar.

Av psykososialum trupulleikum hjá sjónveikum og blindum nevnir Peter Rodney samleikatrupulleikar, vantandi sjálvsásannan, vantandi áræði at vera sosialt virkin, einsemi í sosialum viðurskiftum og ikki at kunna vera uppií.

Talan kann eisini vera um óhóskandi viðurskiftir í umhvørvinum t.d. lærarar ella stuðlar, sum ikki vita um serliga tørvin hjá sjónveikum og blindum og tískil



kenna seg ótryggar.

Peter Rodney veitir m.a. lærarum, málsviðgerum, sjónráðgevum og foreldrum ráðgeving. Eisini hevur hann samrøður við tann sjónveika einsæris.

Hóskvøldið fer Peter Rodney at hava fyrilestur um ta sosialu støðuna hjá sjónveikum og blindum í útbúgvingarsamanhangi og á arbeiðsmarknaðinum.

Fyrilesturin hóskvøldið er á Sjóndeplinum, Íslandsvegi 10A.

Sjóndepilin er ein landsumfatandi stovnur, ið hevur ur til endamáls at stuðla teimum sjónveiku og blindu til meiri sjálvbjargni í heimi, skúla, arbeiði og frítíð. Á Sjóndeplinum er ráðgeving, skeiðvirksemi, dagtilhald og verkstaður.

Fyrilesturin er fyri øllum áhugaðum.

Sosialurin Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814, aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*